# Hagstova Føroya

## søkir búskaparfrøðing til tjóðarroknskap

**Starvið**
Arbeiðið umfatar samfelagsbúskaparlig hagtøl sum heild og serstakliga at verða við í arbeiðinum við tjóðarroknskapi, sum fer fram í verkætlanarbólki saman við øðrum búskaparfrøðingum og teldufrøðingum. Meira nágreiniligt arbeiðsøki finna vit í felag við tann, sum kemur í starvið.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í samfelagsbúskap, sum dugir at arbeiða við mest vanligu telduforritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Upplæring fer fram á stovninum.

Hóast tað krevst, at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.scient.oecon., cand.merc. við samfelagsbúskapi ella bachelor útbúgving í búskaparligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfalagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er samskifti og útgáva.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelagið.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15.mei.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Hermann Oskarsson, stjóra, á telefon 35 28 00 ella í telduposti til hermann@hagstova.fo

# Bridge FM Pør

Semifinala fyri pør verður í Bridgehúsinum í Havn 7. apríl kl. 10.00.

Tilmeldan á tlf 319142 ella í Bridgehúsinum

**FBS**

# Pedagogur

Søkt verður eftir 1 pedagogi 30 tímar um vikuna, at byrja 1. mai 2001 ella eftir avtalu. Starvið er á stovu við 11 børnum í aldrinum 1-3 ár.

Vit eru ein stovnur við 44 heildagsplássum til børn í aldrinum 0-3 ár.

Mál okkara er at geva hesum smáu ein góðan og tryggan karm um ein gevandi og mennandi gerandisdag. Hevur tú hug at hjálpa okkum við tí?

Lønar- og setunarviðurskiftir sambært sáttmálan millum Føroya Landsstýrið og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn við prógvið og møguligum viðmælum skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2001.

Eisini verður søkt eftir sjúkra-/frítíðaravloysara at byrja beinanvegin ella eftir avtalu!

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stovnin.

**STELLA MARIS VØGGUSTOVA**
Varðagøta 11 · Postrúm 1202
FO-110 Tórshavn · tlf. 31 28 53/ fax 31 69 54
E-mail: maris@post.olivant.fo

# Frisør søkist

**Hár og Smyrsl v/ Biritu Arge**
Andrasargøta 11 · Tlf. 318845




ÍBýin
*- hvønn hósdag*

DAGFØR
TEG
Sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Sosialurin

ítróttur

Nr. 66 • mikudagur • 4. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Uni fer helst úr ÍA

**Fíggjarliga støðan í felagnum krevur stórar niðurskurðir í rakstrinum, og landsliðsfremherjin vil ikki góðtaka ein broyttan sáttmála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Eftir nøkur ár sum yrkisleikari í Íslandi, er nú líkt til, at Uni Arge aftur fer at gera síni mál í heimligu kappingini*

Umvegis heimasíðuna hjá HB fræstist fyri stuttum, at landsliðsframherjin, Uni Arge, skal vera ávegis til barndómsfelagið, eftir at hann seinnu árini hevur roynt seg sum yrkisleikari í Íslandi.

Sjálvur sigur Uni Arge tó, at tað ikki er nakað ítøkjuligt hald í hesum tíðindum, men hann sigur tó so mikið sum, at tað allar helst ikki verður við ÍA, at hann fer at spæla fótbólt komandi ár.

– Sáttmálin hjá mær við ÍA fevnir um tvey ár, og enn restar eitt ár eftir av hesum. Fyri undanfarna kappingarár hava báðir partar eisini yvirhildið allar lutir í sáttmálanum, men tað sær ikki út til, at hetta verður galdandi fyri komandi ár, greiður Uni frá.

– Felagið hevur boðað frá, at fíggjarstøðan ikki er nóg góð til at uppfylla teir sáttmálarnar, sum í løtuni eru galdandi við spælarar og venjara, og tí er ætlanin, at ein kollektivur niðurskurður skal minka um raksrarútreiðslurnar. Teir hava eisini givið mær eitt tilboð, men eg havi boðað frá, at eg undir ongum umstøðum kann góðtaka hetta.

– Teir hava so svara mær aftur, at tað er púra greitt, at verandi sáttmálin ikki kann halda fram, og tí røkist ikki fyri, at eg framyvir fari at spæla við felagnum, sigur Uni Arge.

### Framtíðin

Hvar framtíðin hjá vandamikla framherjanum so liggur, tykist enn ikki vera greitt, men onkrar ábendingar tykjast tó vera um, at hann í komandi kappingarári aftur fer at gera síni mál í Føroyum.

– Tað er so ikki serliga sannlíkt, at eg fari aftur til Íslands at spæla. Skal eg spæla í Føroyum, má eg sjálvandi fyrst kanna teir møguleikar, sum eru, og her fellur tað mær í øllum førum náttúrligt at tosa við HB fyrst. Eg fór úr HB til Íslands, og eg havi ongan tíð umboðað nakað annað felag her heima, sigur Uni Arge, sum tó ikki vil siga meira um hetta.

Sostatt tykist tað enn ikki greitt, hvar fótbóltsframtíð hansara fer at liggja, men hinvegin tykist ikki ósannlíkt, at tað aftur verður HB, sum fer at fáa gleðina av mongu málunum. Uni er annars ein av bert tveimum leikarum, sum hava skotið yvir 100 mál í føroysku landskappingini, síðani hendan varð víðkað í 10 lið. Hann hevur síðani 1988 skotið 102 mál fyri HB. Størsta máltalið fekk hann í 1997, tá hann í 16 dystum skeyt 24 mál. Íroknað steypa- og landskapping hevur Uni leikt 199 dystir fyri felagið, og hevur hann í hesum skotið 159 mál.

**Støðan 1. Deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 | 10 | - | 0 | - | 1 | 726 | 548 | 178 | 32 |
| 2 | StÍF | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 674 | 595 | 79 | 24 |
| 3 | Kyndil | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 640 | 585 | 55 | 21 |
| 4 | Neistin | 11 | 6 | - | 0 | - | 5 | 570 | 579 | -9 | 18 |
| 5 | KÍF | 11 | 5 | - | 2 | - | 4 | 557 | 612 | -55 | 15 |
| 6 | H71 | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 579 | 676 | -97 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 0 | - | 1 | - | 9 | 501 | 652 | -151 | 4 |

KÍF–Tjaldur 24–23 (12–11)

# Tjaldur framvegis í botni

**Hóast nær við, so eydnaðist heldur ikki hesa ferð hjá runavíkingunum, sum sóu KÍF vinna tepran sigur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Liðskiparin hjá kollfirðingum iðrar seg um, at teir ikki fingu gongd á stigasavnanina nakað fyrr*

Tað, sum undan endaspælinum sá út til at gerast eitt spennandi hálvár hjá Tjaldrinum, hevur ístaðin víst seg at gerast nakað, sum líkist einum marrudreymi.

Tap oman á tap hava skolað oman móti liðnu, og royndirnar at sleppa burtur úr botninum hava verið fullkomuliga miseydnaðar higartil. Eittans stig er komið til høldar í endaspælinum, og so løgið tað ljóðar, varð hetta fingið móti strandingum, sum longu nú hava tryggjað sær silvurmerkini.

### Javnur dystur

Mánakvøldið skuldu kollfirðingar royna seg móti KÍF, og heldur ikki hesa ferð skuldi talan gerast um nakað stig til illa sperdu runavíkingarnar. Talan var annars um ein sera javnan dyst største partin av tíðini. Eitt skifti í fyrra hálvleiki vóru tjaldursmenn eisini omaná, men eftir at KÍF tá fór fram um, fingu gestirnir ikki togað seg upp aftur, hóast tað fleiri ferðir var nær við.

Takið á vertunum varð tó heldur ikki slept, og nakað inn í seinna hálvleik eydnaðist Tjaldrinum at koma upp á javnt, men tá KÍF beint eftir hetta skeyt fýra mál á rað, tóktist dysturin avgjørdur. Tað eydnaðist tó vertunum enn eina ferð at stríða seg upp á javnt, men heldur ikki hesa ferð fingu teir lagt seg framum, og so kundu kollfirðingar ístaðin skjóta sigursmálið, tá ein minuttur restaði at spæla.

### Ov seint

Við sigrinum hildu kollfirðingar sostatt fast um positivu gongdina, sum teir hava havt, og liðskiparin hjá liðnum, Petur Martin Johansen, helt eisini, at endaspælið hevur víst, at liðið er betri enn støðan á stigatalvuni sýnir.

– Tað haldi eg so avgjørt. Um vit høvdu vunnu eins nógv í grundspælinum, høvdu vit allar helst ligið og barst um heiðursmerki. Tað er so ikki nakað, sum vit fáa gjørt nakað við, men iðra seg um tað kann mann sjálvandi.

– Hinvegin kann eisini leggjast afturat, at tað hóast alt framvegis ikki riggar nóg væl hjá okkum. Til dømis í hesum dystinum móti Tjaldri, har vit fleiri ferðir tveita eina hampuliga leiðslu burtur. Tað er so nakað, sum vit mugu arbeiða við, men tað er einki at ivast í, at úrslitini í endaspælinum hava givið okkum orsøk til at síggja positivt upp á komandi kappingarárið, sigur Petur Martin at enda.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
KÍF: Jákup Dam 7, Durica Tomic 6(1), Petur Martin Johansen 4, Regin Petersen 3, Iljan Topic 2, Jónálvur Johannesen 1, Kristian Madsen 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 6(3), Tummas Magnussen 4, Svein í Heiðunum 4, Dánjal Kjærbo 3, Dejan Macut 3, Arnfinn Langgaard 2
Brotskøst: KÍF 1, Tjaldur 5
Útvísingar: KÍF 3, Tjaldur 2
Dómarar úr VÍF: Ingi Olsen og Agnar Joensen